## Venjarin hjá Liktinstein givin

Eftir at Liktinstein mikukvøldið tapti 4-0 fyri Danmark á heimavølli, hevur venjarin hjá teimum boðað frá, at hann gevst í starvinum. Martin Andermatt hevur vant Liktinstein í tvey og eitt hálvt ár, og tað var ikki endiliga orsaka av tapinum ímóti Danmark, at Andermatt gavst. Hann hevur nevniliga fingið kjansin sum venjari hjá Young Boys í bestu sveisisku deildini, og hesum kjansi hevur hann tikið av. Fótbóltssambandið í Liktinstein fer tí at leita eftir nýggjum venjara til liðið, sum spælir næsta dystin í EM-undankappingini í mars mánaði næsta ár.



## Rókur, Rasmus og Páll halda fram

Rókur á Fløtum Jespersen, Rasmus Nolsøe og Páll Mohr Joensen hava allir gjørt nýggjan tvey ára sáttmála við HB. Rókur Jespersen er toppskjútti hjá HB í Formuladeildini higartil í ár. Hann hevur skotið 12 mál. Páll Mohr Joensen hevur verið nógv umtalaður í sambandi við kærumálið hjá HB í steypakappingini, men hann hevur eisini skorað 10 mál og spælt væl fyri HB. Rasmus Nolsøe er verjuspælari, sum eisini er góður frísparksskjútti.
Nú hevur HB so tryggjað sær undirskriftirnar hjá teimum á nýggjar tvey ára sáttmálar

# Skaðar gera um seg í hondbóltinum

**Mest spennadi hondbóltsdysturin hjá monnum hetta vikuskiftið verður á Skála, har VÍF vitjar hjá StÍF. Felags fyri liðini í mansdeildini er, at tey eru nógv darvað av skaðum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tveir dystir vera á skránni í bestu mansdeildini leygardagin. Toppdystur verður á Skála, har StÍF og VÍF hittast. Bæði liðini vunnu sínar fyrstu dystir, og tí er lagt upp til stóran spenning inni á Skála.

StÍF er sera illa rakt av skaðum, og tí vita tey á Strondum og Skála ikki heilt, hvat tey skulu vænta av hesum kappingarárinum. Leivur Justinusen er ikki klárur enn vegna skaða, meðan bróðurin Sveinur Justinusen hevur fingið boð um at binda frið í fimm mánaðir orsaka av einum skaða í knænum. Haraftur manglar Artur Johansen, sum fekk beinleiðis reytt kort í Havn seinasta vikuskiftið.

Vit frætta av Strondum, at teir ætla at gera sítt ítarsta fyri at vinna dystin ímóti VÍF eisini.

VÍF manglar eisini onkrar leikarar. Ingi Olsen hevur ein lítlan skaða at dragast við, meðan Agnar Joensen ikki er klárur enn. Teir ætla tó at byggja víðari á sigurin á Kyndli. Ingi Olsen sigur, at teir skulu finna sama vilja fram, sum tann ímóti Kyndli, tí so skal tað nokk ganga.



*StÍF og VÍF, sum vunnu í fyrsta umfari av landskappingini, spæla í høllini á Skála leygardagin*

Hin dysturin leygardagin er ímillum KÍF og Neistan. Hesi bæði liðini taptu teirra fyrstu dystir í ár, so tey ætla væntandi bæði at vinna. Úr Kollafirði frætta vit, at allir leikarar eru tøkir til dystin móti Neistanum. Fótbóltsleikararnir eru sjálvandi undantøk. Rógvi Weihe, sum hevur verið í Danmark í lestrarørindum kemur heim leygarmorgunin, og hann verður væntandi partur av KÍF-liðnum.

Neistin hevur allar sínar mans tøkar til dystin leygardagin. Vit frætta frá Neistanum, at teir ætla at vinna dystin. Venjarin, Claus Rasmussen sigur, at um teir fáa verjuna at rigga, so væntar hann eitt gott úrslit.

**Skaðar gera um seg hjá Kyndli**
Í síðsta dystinum hjá monnunum spæla Kyndil og H71 í høllini á Hálsi sunnudagin. Hjá Kyndli sær einki serligt út við fólki. Høgni Klein, sum kom heim til dystin í Vestmanna, verður ikki við henda dagin. Ivamál er, hvørt Lars Blak verður tøkur til dystin sunnudagin. Hann kemur heim sunnukvøldið, men í Kyndli vænta teir ikki, at hann verður klárur. At enda er ein av ungu leikarunum, Hjalti M. Jacobsen, ivasamur, tí hann møguliga hevur brotið nøsina.

Hjá H71 sær eitt sindur betri út við fólki. Johnny Durhuus fór út við skaða í økslini ímóti KÍF, og hann verður ikki við ímóti Kyndli. Harafturat er ivasamt, um Niels Viggo Niclasen verður klárur. Hann hevur ein skaða í tjúkkanum og skal møguliga leggjast undir skurð.

Kyndil tapti sín fyrsta dyst í ár, so lítil ivi er um, at teir ætla at vinna dystin ímóti hoyvíkingum. H71 fekk hinvegin eina góða byrjan uppá kappingina, tá teir vunnu á KÍF. Úr Hoyvík frætta vit, at teir ætla at vinna umaftur, men teir ásanna, at hetta ikki verður lætt ímóti Kyndli.

# Spennandi kvinnudystur á Hálsi

**Føroyameistararnir úr Stjørnuni spæla sín fyrsta dyst í hesum kappingarárinum, og í Havn kemur VB á vitjan hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kvinnurnar skulu eisini í dyst hetta vikuskiftið. Leygardagin vitja meistararnir hjá Stjørnuni á Skála. Hetta er fyrsti dystur hjá Stjørnuni í landskappingini, men lítil ivi man vera um, at tær ætla sær inn á Skála eftir báðum stigunum.

Strandakvinnur fingu eina ringa byrjan, tá tær fingu ein ordans lúsing frá Neistanum í Havn síðsta vikuskiftið. Neistin vann við 15 málum, og um StÍF ikki vísir betri spæl leygardagin, so kunnu tær vænta somu viðferð frá Stjørnuni.

Hin dysturin er á Hálsi sunnukvøldið, har Kyndil tekur ímóti VB. Kyndil hevur styrkt sær munandi um liðið frá síðsta kappingarárið, og tí kunnu vit vænta nógv av teimum. VB hevur mist onkran leikara frá í fjør, men tær ætla sær eisini at leika við í oddinum í ár.

Hetta er fyrsti dysturin hjá hesum báðum liðunum í kappingarárinum, og tí er ringt at meta um, hvat vit skulu vænta. Eitt er tó sikkurt. Bæði liðini ætla sær sigurin sunnudagin, og tí kunnu fólk vænta ein sera spennandi dyst í høllini á Hálsi.

## Stór flogbóltskapping í Havn

**Stór flogbóltskapping verður í Havnini í vikuskiftinum, har eldru deildirnar skulu kappast. Vinnarin í meistaradeildini hjá kvinnum og monnum sleppur beinleiðis í steypafinaluna**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eldru deildirnar í flogbólti skulu í vikuskiftinum kappast sínámillum í sokallaðu FK-kappingini. FK-kappingin fer av bakkastokki leygardagin, og verður hon spæld í øllum trimum hallunum í Havnini.

Liðini leggja til brots leygarmorgunin, tá innleiðandi umførini verða spæld. Hjá 1. deild kvinnum og 2. monnum verða bert fimm lið við í kappingini, og tí spæla øll liðini ímóti øllum. Vinnarin av hesum samlaða bólkinum verður kosin til vinnara av kappingini.

Hinar fýra deildirnar verða skipaðar sum bólkaspæl. Her koma besta og næstbesta liðið úr hvørjum bólki víðari í semifinalurnar.

Semifinalurnar verða allar spældar seinnapartin leygardagin, og so verða finalurnar spældar seinni um dagin hjá 1. deild monnum og hjá 2. deild kvinnum.

Hjá meistaradeildunum verður kappingin tó eitt sindur øðrvísi. Her verða semifinalurnar spældar seinnapartin leygardagin, meðan finalurnar verða sunnudagin. Vinnararnir hjá bæði meistaradeild kvinnum og monnum leika seg beinleiðis í steypafinluna, sum plagar at vera í februar, so hetta er ein týdningarmikil kapping fyri bæði kvinnurnar og menninar.